

*- Suðuroyggin virkar í dag sum ein hjúnarskilnaður, har tað er tvífalt av øllum. Eg vóni, at vit skjótt ásanna, at alt virkar nógv betur, um vit er saman. Innan vinnulívið er nógv spjaðing, og orkan minkar, tá ein stendur einsamallur. Betri samskifti kann fáa oynna samlaða, sigur Annika Næs Johannesen*

grenja um, at børnini ikki røra seg, vit kundu gjørt eina gongu- og súkklubreyt á ovara vegi, nokta fyri parkeraðum bilum, í staðin fyri sum nú, at vit taka synd í teimum sum súkkla í ferðsluni. Og kosturin. Eg sakni at børnini kunnu koma eitt stað uttanfyri heimið, har tey læra um góðsku, at alt ikki er junk og sodavatn. Tað hevði verið upplagt, at t.d. kantinan í Trongisvági borðreiddi við sunnum kosti til børnini á døgurða, sum foreldrini goldu.

- Tá tíðin so einaferð kemur, er gott hjá børnunum at fara avstað hiðani, men líkamikið hvat tey ætlað, er avgerandi, at tey hava valið. Eg vil ikki uppliva, at míni børn koma í ta støðu, ikki at hætta sær at fara nakrastaðni, tí tey hava gingið í einum vánaligum skúla, sum ikki hevur ment tey, sum hann átti. Tað er ræðuligt. Og tí er tað so týdningarmikið, at politikarnir taka skúlaviðurskiftini í álvara, og megna núverandi persónar ikki at broyta nakað, skulu nýggjar kreftir til, ein ávís útskifting er neyðug.

- Vit sum foreldur vilja eisini vita eitt sindur um politiskar ætlanir og framtíðarútlit, kanska ein evaluering á miðjari leið hevði verið góð. Tí børnini eru okkara gimsteinar, okkara komfort. Og er tilveran her ikki nóg góð, ja, so flyta vit. Tað er tað fantastiska við at hava eina høga útbúgving. Tú hevur altíð valið. Men hava vit eina skipan, har øll hesi liðini virka, so fáa vit eisini fleiri vælútbúgvin fólk at seta búgv her. Harnæst má kommunan slóða soleiðis fyri, at tey, sum ætla sær hendavegin, kunnu keypa tær eitt byggibúgvi stykkið at byggja eini hús á, tí soleiðis er tað ikki í dag.

## Eins og ein hjúnarskilnaður

- Suðuroyggin virkar í dag sum ein hjúnarskilnaður, har tað er tvífalt av øllum. Eg vóni, at vit skjótt ásanna, at alt virkar nógv betur, um vit er saman. Innan vinnulívið er nógv spjaðing, og orkan minkar, tá ein stendur einsamallur. Betri samskifti kann fáa oynna samlaða.

- Og vóru vit ein kommuna, var líkamikið, hvar skattapeningurin kom, so hevði tú sum tilflytari møguleikan at valt tær bústað einastaðni, og havt arbeiði aðrastaðni, eitt nú, um tú kendi onkran í Sandvík, sum átti eini hús sum stóðu tóm, ella tú bara hevði hug at búgva har, og t.d. arbeitt á Tvøroyri. So var heldur ongin klandur um, hvar fólkini við útbúgving skuldu vera, sum vit so ofta síggja. Tá høvdu øll virkað í eini kommunu.

- Vinnan skuldi havt ein leiðara, sum sá alt frá einum heildarsjónarmiði. Vit skuldu fingið eitt høvd ella ein bólk at kanna hvat var best at satsa uppá, KT ella gransking. Ber tað fysiskt til at hava gransking her suðuri, fer tað at kasta pengar av sær, hava vit fólk? Skuldu vit lagt okkum eftir at fingið nýggir almennir stovnar suður, fleiri skúlar/útbúgvingar? Og hvat við tempoinum, vit hava jú fleiri minuttir í døgninum enn aðrastaðni, sigur Annika og flennur, kanska kunnu vit vinna við tí, at vit hava pláss til ferðavinnuna, til skeiðvirksemi, at vera ein rekreatiónsoyggj. Vit mugu hava fleiri bóltar í luftini. Og vit mugu hava útbúgvið fólk at gera neyðugu kanningarnar.

Tá vit at enda tosa um mentunarlívið her suðuri, sær Annika góðar møguleikar fyri framman.

– Hóast núverandi karmar eru smáir, hava vit nógv at bjóða, tí fólk eru blíð og frí og ikki so smæðin. Eg havi havt fleiri góðar tónleikaupplivingar her suðuri, og av og á eru onnur góð tiltøk eisini. Eitt gott mentunarlív nýtist ikki at vera hópin av tiltøkum.Tó sakni eg eitt sjónleikarafelag í oynni.

Og aftaná samrøðuna fara vit ein túr til Froðbiar, elsta bústaðarøkið í Suðuroynni, har Dennis er í holtur við at byggja teimum húsini, ein byggi- og handverkslistarlig perla, í modernaðum stíli, við útsýni yvir øll hini húsini Undir Skorum, og væl afturat.



*Hóast Annika er sera skemtingarsom, er tað í ramasta álvara, at hon setur sær luppbrillurnar á nøsina*

Sosialurin